Vitjan av Mary Drotning í Glyvra skúla

Góðu foreldur og næmingar

Glyvra skúli er partur av Betri Vinir og í tí sambandi kemur Mary Drotning at vitja skúla **mikudagin 11. Juni kl 15.45-16.25**.

Næmingar og lærarar í 2. og 3. flokki koma at hava ein leiklut í vitjanini og møta longu kl 15.00. Næmingarnir møta í penum gerandisklæðum. **Skúladagurin endar kl 12.35.**

0. og 1. flokkarnir luttaka ikki, men eru vælkomin við sum áskoðarir.

Vit vilja heita á foreldur, um ikki at brúka parkeringsplássini við skúlan, tá vitjanin verður. Hetta er avlagt til Fylgið hjá Drotningini og starvsfólk skúlans. Víst verður til onnur alment parkeringspláss í umráðnum.

Tað verður avmerking í skúlagarðinum, oman móti vegnum, hvar fólk kunnu standa. Vit heita á tykkum at vera í góðari tíð.

Skráin er hendan:

Kl 15.00 Næmingarnir í 2. og 3. flokki møta í skúlastovunum.

Kl 15.45 Mary Drotning kemur at vitja

3. flokkarnir hava Betri Vinir spøl í skúlagarðinum, 2b syngur fyri Mary Drotning og 2a hevur eitt Betri Vinir upplegg.

Kl 16.25 Drotningin fer avstað aftur.

Vinarliga

Leiðslan